

# Auto verið til tænastu í fimmti ár

**Í dag fyllir bilstøðin Auto í Havn 50 ár. Í hesum sambandi kemur út bók, ið lýsir bilkoyringina í Havn og úr Havnini. Magnus Gunnarsson hevur skrivað**

BILASØGA
*Eirikur Lindenskov*

Í dag, 17. desember, eru liðin 50 ár síðan bilstøðin Auto í Havn varð stovnað sum partafelag.

Støðin varð upprunaliga stovnað sum P/F Taxa A/S. Í 1955 skifti støðin navn til P/F Auto. Í hesum sambandi verður móttøka á Hotel Hafnia í dag frá kl. 14 - 17, har øll eru vælkomin.

Fríggjadagin 29. november 2002 varð felagsmynd tikin av starvsfólkum í Auto.

Tey, ið eru á myndini, eru:

1. Thorvaldur Haraldsen
2. Jón Haraldsen
3. Regin Enghamar
4. Johan Simonsen
5 Martin B. Nielsen
6. Danny Danielsen
7. Kári Enghamar
8. Terji Jensen
9. Bennvør F. Eyvindsson
10. Heðin Mouritsen
11. Jákup Andreas Mohr
12. Karsten Jensen
13. John Nilssen
14. Magnus Simonsen
15. Jens av Reyni
16. Ole Nikolajsen
17. Magnus Egholm
18. Thorvaldur Haraldsen
19. Tórfríða Enghamar
20. Maria Mohr
21. Elisabeth Egholm
22. Esther Drewsen
23. Guðni Egholm
24. Kári F. Eyvindsson
25. Benadikta Johannesen
26. Óluva Johannesen
27. Jón Birgir Enghamar
28. Pól Jensen
29. Lina av Reyni
30. Eva Nolsøe
31. Inga Nilssen
32. Bjarni Enghamar
33. Magnus Fuglø
34. Niels Pauli Hjaltalin
35. Jógvan Rasmussen
36. Poul Anker Hansen
37. Eirikkur Rasmussen
38. Óla Jákup Simonsen
39. Johannes Danielsen
40. Regin Thorgeirsson
41. Sámal av Reyni
42. Hans Pauli Joensen
43. Dánjal Norðfoss
44. Heðin Norðfoss



*Mynd. Jens Kristian Vang*

# 12 tímar úr Vágum til Havnar í 1945

FERÐASAMBAND
*Úr bókin »Auto, altíð til tænastu«*

Nú tekur tað okkum bert hálvan tíma at koyra millum Vágar og Havnina. Árini eftir kríggið bleiv nógv skrivað um Oyggjarvegin, og hvussu vánaligt sambandið var úr Havnini til bygdirnar norðanfyri.

Oyggjarvegurin gekk tá bert nakað niðan frá Havnini.

Í nýggju bókini »AUTO - altíð til tænastu« er eitt kapittul um hesa skriving í bløðunum. Í einum lesarabrævi í Dagblaðnum 23. februar 1945, sum er undirskrivað »Fleiri ferðafólk«, verður sagt frá einum túri úr Vágum til Havnar, ið tók 12 tímar. Hetta lesarabrævið vísir, hvussu ringar umstøðurnar vóru hjá teimum sum ferðaðust millum bygdir í Føroyum.

### Ferðasambandið úr Vágum til Havnar

»Ferðasambandið úr Vágum til Havnar verður hildið at vera gott, men ikki er altíð so.

Sum kunnugt verður mánadag siglt av Fútakletti til Vestmanna og harfrá við bili til Kollafjaðrar. Seinasta mánadag vóru um 8 ferðafólk við, harímillum eitt barn sum skuldi á sjúkrahúsið.

Barnið mátti liggja eftir í Kollafirði. Hetta var orsakað av tí, at bert ein bilur, tann hjá Carl A. Jensen, kom til Vestmanna, hann kundi ikki taka alt fólkið. At enda fekst so afturat ein opin lastbilur úr Vestmanna, tá hann kom til Kollafirðar, var rutubáturin »Streymur« farin. Av tí at fleiri av ferðafólkunum avgjørt skuldu vera í Havn tann dagin, varð hildið á fjøllini - til gongu eftir oynni, sum fyri 100 árum síðan, bert tann munur, at nú eru fólk hvørki klødd ella skødd at fara eftir oyggj. Til alla lukku settist maðurin við tí sjúka barninum eftir á Oyrareingjum, tí stormurin var so nógvur, at ein mátti leggjast til tíðir, fyri ikki at fúka um koll.



*Mynd av rutubátini, Ólavi, á Vestmanna*

Vit halda nú, at teir, sum geva seg av við at flyta ferðafólk ímillum bygdir, bæði á sjógvi og landi, áttu at kent á sær eina ábyrgd at halda ferðirnar regluligar.

Lítið nyttar tað at sigla til Vestmanna av Fútakletti um ikki fólk sleppur vegin fram. Nei, lat okkum tá heldur sleppa á land á sunnaru gjógv. Henda ferðin úr Vágum til Havnar tók okkum 12 tímar, og tey, ið við vóru, vilja leingi minnast hesa vána ferð og ásanna, at lítið verður gjørt fyri ferðafólk í Føroyum.

Undirskrivað: »Fleiri ferðafólk«



# Metingarnar eru skeivar

**Meirilutin í fíggjarnevndini hevur skorið munandi av lógarbundnum útreiðslum, millum annað til fólka- og fyritíðarpensjónir og forsorg. Tølini halda ikki og yvir 14 milliónir krónur mangla í, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, ið hevur eftirkannað tølini**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Andstøðan finst at álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini, og skýrir meirilutan at hava spart upp á kvamsvís. Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, hevur longu gjørt greitt, at í tølunum í álitinum hjá fíggjarnevndini mangla 14,3 milliónir krónur til lógarbundnar útreiðslur til pensjónir.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sammett við upprunaliga uppskotið til fíggjarlóg eru tilsamans 52 milliónir skornar av játtanini til almannamál í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Stórur partur av skerjingini stavar frá, at lógarbundnar útreiðslur til fólkapensjónir, fyritíðarpensjónir, vanliga forsorg og barnaforsorg eru mettar lægri enn upprunaliga.

Eitt nú væntar fíggjarnevndin at útreiðslurnar til fólkapensjónir verður 15 milliónir lægri, meðan útreiðslurnar til fyritíðarpensjónir verða 10 milliónir lægri.

Men hesi tøl fara ikki at halda, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum. Síðan landsstýrismaðurin fríggjamorgunin fekk álitið frá fíggjarnevndini, hevur umsitingin í Trivnaðarmálaráðnum eftirkannað metingarnar hjá fíggjarnevndini. Og niðurstøðan er greið. Metingarnar fara ikki at halda.

Páll á Reynatúgvu vísir á, at 7,7 milliónir eru á muni millum metingina hjá fíggjarnevndini og umsitingini av útreiðslunum til fólkapensjónir, meðan 1,3 millión er á muni millum metingina av lógarbundnu útreiðslunum til fyritíðarpensjónir. Harumframt fara 3,6 milliónir at mangla í játtanini til vanliga forsorg og tvær milliónir á játtanini til barnaforsorg, vísa metingarnar hjá umsitingini av almannamálum. Tilsamans er 14,6 milliónir krónur á muni millum metingarnar hjá meirilutanum í fíggjarnevndini og metingarnar hjá umsitingini av lógarbundnu útreiðslunum til almannamál.

– Í fyrstu atløgu fari eg at gera vart við munin, tá eg fái orðið undir 2.viðgerð av fíggjarlógini. Talan er um lógarbundnar útreiðslur, og tí eru bara tveir møguleikar – antin mugu meira pengar setast av, ella mugu lógarbroytingar gerast, sum lækka útreiðslurnar, sigur Páll á Reynatúgvu.

Landsstýrismaðurin í almannamálum sigur, at hann, meðan málið lá í fíggjarnevndini, gjørdi nevndina varuga við sínar metingar av útreiðslunum til hesi lógarbundnu øki, men at hann síðan bara hevur kunnað staðfesta, at fíggjarnevndin ikki hevur valt at fylgja metingunum hjá umsitingini í Trivnaðarmálaráðnum.

Páll á Reynatúgvu sigur, at hann í fyrstu atløgu fer at kunna løgtingið um frávikið millum metingina hjá sær og metingina hjá fíggjarnevndini av hesum lógarbundnu útreiðslum. Síðan má greiða fáast á, hvat meirilutin í fíggjarnevndini hevur hugsað sær. Annaðhvørt talan verður um at seta pengarnar aftur á fíggjarlógina, ella tingið vil gera neyðugu lógarbroytingarnar, tvs. at skerja pensjónirnar, so játtanin fer at halda kortini.

# Sparingar upp á kvamsvís

**Andstøðan finst at álitinum hjá samgonguni til fíggjarlóg og setur spurnartekin við, hvørt tølini, sum liggja til grund fyri yvirskotinum í fíggjarlógaruppskotin um yvirhøvur hanga saman, ella tað eisini næsta ár kunnu væntast nógvar og stórar eykajáttanir**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Mánamorgunin fór løgtingið undir 2. viðgerð av uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003. Afturat fíggjarlógaruppskotinum, sum Karsten Hansen legði fram 30. september, eru tvey álit grundarlagið undir viðgerðini. Eitt meirilutaálit frá samgonguni, ið vísir 240 milliónir í yvirskoti áðrenn avdráttir, ella 90 milliónir størri yvirskot enn upprunaliga uppskotið. Samtíðis eru andstøðuflokkarnir komnir við sínum minnilutaáliti, ið vísir 158 milliónir í yvirskoti áðrenn avdráttir av skuld, ella góðar átta milliónir hægri enn uppruna uppskotið.

Í sínum framløgum settu andstøðuflokkarnir spurnartekin við inntøku- og útreiðslumetingarnar hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum í fleiri førum víkir munandi frá tølunum hjá ymsu aðalráðunum.

Vilhelm Johannesen, úr Javnaðarflokkinum, ið eisini er 2.formaður í fíggjarnevndini vísti millum annað á, at síðan løgtingsvalið í 1998 eru samlaðu útreiðslurnar av eykajáttanarlógum yvir 600 milliónir krónur. Vilhelm Johannesen setti spurnartekin við, hvørt sparingarnar í álitinum frá meirilutanum bara eru gjørdar upp á kvamsvís, fyri síðan seinni at játta pengarnar við eykajáttanarlógum, tá nakað er liðið av 2003.

### Almenna umsitingin

Andstøðuflokkarnir vístu á, at almenna miðfyrisitingin er nógv vaksin og aðalráðini eru í dag níggju í tali. Andstøðan mælir til at skerja talið av aðalráðum til tey upprunaligu seks. Mælt verður til, at Oljumálaráðið verður lagt undir Vinnumálaráðið, Løgmálaráðið skal flytast aftur undir Løgmansskrivstovuna, og Almanna- og Heilsumálaráðini skulu leggjast saman aftur í eitt Trivnaðarmálaráð.

Andstøðan førir fram, at orsøkin til vaksandi talið av aðalráðum einans kemst av, at ein politisk kabal skal ganga upp, og mælir andstøðan til at skerja umsitingina beinanvegin.

### Skattalættin

Eisini verður funnist at, at meirilutin ikki hevur tikið lovaða skattalættan við í álitið til fíggjarlóg fyri 2003. Andstøðuflokkarnir vísa á, at hetta verður gjørt, samtíðis sum meirlutin í fíggjarnevndini væntar at fáa 10 milliónir í avleiddum inntøkum av skattalættanum.

Víst verður á, at hetta hongur ikki saman, og Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum setti spurnartekin við, hvørt henda mannagongd yvirhøvur er lóglig.

# Vinnunevndin mælir frá broytingum í lógini fyri Norðoyatunnilin

**Meirilutin í vinnunevndini tekur ikki undir við uppskotinum um at tær 32,5 milliónirnar, ið landskassin eftir ætlan skal gjalda til Norðoyatunnilin í 2004, verður útsett til 2005.**

FAST SAMBAND
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Meirilutin í vinnunevndini, sum eru umboðini hjá andstøðuflokkunum, tekur ikki undir við at broyta lógina um fast samband um Leirvíksfjørð. Tað er greitt, nú málið er komið aftur úr nevndini.

Íløgukarmurin á fíggjarlógini er trongur, bæði í 2003 og 2004, serliga tí at nýggja suðuroyarskipið fer avstað við stórum parti av samlaðu játtanini. Tí mælir landsstýrismaðurin í vinnumálum til at broyta lógina um fast samband um Leirvíksfjørð.

Í galdandi lóg stendur at landsstýrið skal játta 32,5 milliónir krónur árliga, fyrstu ferð í 2003. Longu nú er greitt, at eingir pengar vera játtaðir næsta ár, men at peningurin ístaðin verður játtaður við eini eykajáttanarlóg, sum verður løgd fyri tingið ein av døgunum.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrismanninum skal lógin broytast, so pengar verða játtaðir við eykajáttanarlógini í ár, síðan skulu 32,5 milliónir setast av á fíggjarlógini árliga frá 2005 til 2008, og síðan 42,5 milliónir í 2009. Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrismaðurin, at broytingin væntandi ikki fer at seinka verkætlanina, sum tó gerst 10 milliónir krónur dýrari, tí rentuútreiðslurnar hjá P/F Norðoyatunlinum verða størri.

Eftir 1.viðgerð varð málið beint í vinnunevndina, ið er onnur av nevndunum, har andstøðan hevur meiriluta. Og Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin mæla til at broyta uppskotið, so peningur verður settur av til Norðoyatunnilin longu í 2004, og at síðsti partur av játtanini verður latin í 2008. Hóast umboðini hjá Tjóðveldisflokkinum taka undir við uppskotinum, siga tey í viðmerkingum at eftir teirra tykki spælir landsstýrið høgt spæl við at koma við uppskoti um at broyta lógina fyri Norðoyatunnilin. Sum er, liggur verkætlanin í fastari legu fíggjarliga, meðan broytingaruppskoitð skapar ein ávísan ótryggleika um sjálva fíggingina av verkætlanina.

Álitið frá vinnunevndini varð lagt fram fríggjadagin, og í næstum fer løgtingið at hava 2.viðgerð av uppskotinum um at broyta lógina um fast samband um Leirvíksfjørð.